


Har mentan, søga, byggilist og fótbóltur møtast



Staddur á ovasta punktinum í Vatikaninum



Í Forum Romanum

fótbóltsdyst. Men hvørki á túrinum í Rom í ár, ella í Moskva í fjør, var meiningin bara at fara fyri at hyggja eftir fótbólti. Allir stórbýir eiga áhugaverd støð, sum eru verd at vitja, og tá ein er farin avstað aftur, so eigur ein enn til góðar at vitja fleiri støð í hesum stórbýum.

Tá Rom so stendur á breddanum – við ella uttan fótbóltsdyst – so er alneyðugt at seta sær eitt minimum av málum fyri eina ferð til italska høvuðsstaðin. Colloseum, Forum Romanum, Trevio Fontana, spanska trappan, Pæturstorgið, Vatekanið, Sixtinska kapellið, Einglaborgin o.s.fr. Listin er langur, men støðini sum eru nevnd her, eru eitt »must«. Colloseum og Forum Romanum eru merkt av tíðarinnar tonn, sum hevur bitið í skjótt 21 øldir, men tað er stórbært at skoða. Tá ein stendur inni í Colloseum renna myndirnar frá filminum hjá Russell Crowe, »Gladiator« fram fyri einum. Ferðaleiðarin nevndi eitt ótal av menniskjum, sum vóru offraði í teimum ræðuligu leikunum, sum fóru fram á Colloseum. Gladiatorarnir skuldu endurgeva bardagar, sum rómverska ríkið hevði verið partur av, og í øllum tí rómverska hitanum, fór kalt niður eftir rygginum, tá ferðaleiðarin greiddi frá tí grotesku endamálsgreinini, sum rómverjar høvdu við Colloseum á sinni.

## Colloseum og fótbóltur

Fótbóltsdystur hevur ongantíð verið spældur á Colloseum, hvat vit vita um. Men dagarnar áðrenn Champions League finaluna, høvdu UEFA og rómverska býarstýrið skipað soleiðis fyri, at økið kring Colloseum, var eitt Matchfestiva«-økið. Risastóra Champions League steypið – steypið við teimum stóru oyrunum – var útstillað á festivaløkinum. Tjøld við framsýningum um FC Barcelona og Manchester United og søguni hjá Champions League vóru á staðnum, um ein vildi koma í rætta stemningin í góðari tíð.

Menn, sum vóru klæddir í rómversk herklæðir royndu at bóndafanga fólk. Teir komu stórleypandi og bjóðaðu fólk at koma á mynd saman við einum sonnum rómverskum hermanni. Men vit høvdu ikki meir enn klikt myndina, so komu kravboðini: »20 euros please«. 20 evrur fyri eitt klikk, nei takk. Vit bjóðaðu bóndafangaranum fimm evrur, men hann skoytti ikki um tær, og so var bara at sleppa sær víðari.

## Stuttliga orðaspælið

Nakrir áskoðarar hjá Manchester United dugdu kortini at spæla sær við teimum kendu rómversku máliskunum. Vit sóu United-fjepparar ganga runt við einari t-skjúrtu við einari mynd av verjukempuni hjá Manchester United, Nemanja Vidic. Á skjúrtini stóð: »Veni, Vidi, Vidic« – á latínskum máli merkir tað: »Eg kom, eg sá Vidic«. Tætt við Colloseum sóu vit eisini ein sigursælan United-bannara, sum reflekteraði um søguna, tá rómverjar hertóku Brittanium. Á banaranum stóð at lesa: »AD 69 Rome invaded Manchunia, AD 2009 Manchunia invades Rome«.

Við Colloseum møttu vit eisini einum United-fjeppara, sum hevði sæð allar tær tríggjar Europa Cup finalurnar hjá Manchester United, á Wembley í 1968, í Barcelona í 1999 og í Moskva í 2008. Hann var rættiliga altráur eftir at keypa atgongumerkið frá mær, og helt, at eg átti at selt tað til hansara, tí hann var úr Manchester. 13 ára gamal skulkaði hann frá skúlanum, fyri at kunna síggja sítt elskaða Manchester United vinna 4-1 á Benfica í finaluni á Wembley heilt afturi í 1968. Tá fekk hann stovuarrest í 14 dagar fyri at skulka frá skúlanum. Men tað var vert at líða fyri sítt elskaða Untied. Spennandi frásagnirnar vóru kortini ikki grund nokk hjá okkum til at selja eina spennandi uppliving frá okkum.

## Sum í 1907-1993

Í tveir dagar vóru tilstandir í Rom, sum fekk ein at hugsa um rúsdrekkalógina, sum var í gildi í Føroyum, øll árini millum 1907 og 1993. Býarstýrið í Rom gav boð um eitt rúsdrekkabann, sum skuldi vera galdandi frá klokkan 17 týsdagin, og til klokkan seks hósmorgun. Almenna orsøkin segðist vera at tryggja, at friður valdaði áðrenn dystin.

Týskvøldið fóru vit ein langan spákitúr gjøgnum býin, og har sóu vit sjón fyri søgn, at tað gekk heldur misjavnt hjá veitingarstøðunum at halda bannið hjá rómversku býarmyndugleikunum. Á einum veitingarstaði kundi ein bara fáa kaffidrykkir og mineralvatn, á grannastaðnum var skonkt, sum um tey ikki vistu nakað um forboðið. Aðrastaðni var forboðið galdandi fyri útlendingar, men gjarna ikki fyri italiumenn, og so slettis ikki fyri italskar kvinnur, ikki minst um talan var um vakrar, italskar kvinnur. Í hálvtannað samdøgur manglaði bara, at fólk fóru á posthúsið at loysa út. Sjálvur arbeiddi eg seks ár á høvuðsposthúsinum undir tí gomlu rúsdrekkalógini, og bleiv eg heilt nostalgiskur, um teir fornu føroysku tilstandirnar, sum lutvíst eisini høvdu funnið sín veg til Rom - also býin!



Inni á olympiska leikvøllinum

## Sangduelur

Týskvøldið sóust nógvir fjepparar frá báðum liðum. Løgreglan tykist hava tamarhald á støðuni, og vit sóu einki ónt blóð vera útvekslað.

Komnir til Trevio Fontana – Treviokelduna fingu vit eina paradoksala uppliving. Samstundis sum vit stóðu og eygleiddu tað listarfrøðiliga meistaraverkið, sum Treviokeldan er, so fór á sjálv sama staði ein

Sosialurin